Árni og Símun komu í 3hj í dystinum móti Rumenia. Eftir hesar meldingar:

| Norðan | Eystan | Sunnan | Vestan |
|---|---|---|---|
| 1nt | dobl | pass | pass |
| Redobl | pass | 2kl | 2sp |
| pass | 3hj | al. pass | |

| | | |
|---|---|---|
| | ♠ K J 9<br>♥ T 7 4<br>♦ A J 9<br>♣ A Q 5 4 | |
| ♠ Q 8 7 6 3<br>♥ J 6 2<br>♦ Q 5 2<br>♣ J 2 | N<br>W E<br>S | ♠ A 5<br>♥ K Q 8 5 3<br>♦ K 7 4<br>♣ K 7 6 |
| | ♠ T 4 2<br>♥ A 9<br>♦ T 8 6 3<br>♣ T 9 8 3 | |

Útspælið var kleyvar tíggju til drong og essið. Norðan spældi nú hjartar aftur til essið og meira hjartara. Símun tók við dronginum og spældi kleyvara til kongin og kleyvara til trumf og síðani rútara til kongin. Síðani bleiv trumfurin tikin í botn. Tá tann síðsti verður spældur er støðan hendan:

| | | |
|---|---|---|
| | ♠ K J<br>♥ -<br>♦ A J<br>♣ 5 | |
| ♠ Q 8 7<br>♥ -<br>♦ Q 5<br>♣ - | N<br>W E<br>S | ♠ A 5<br>♥ 5<br>♦ 7 4<br>♣ - |
| | Líkamikið! | |

...uppá hjartar 5 kastar vestur spar, men norðan kann ikki undvera nakað kort. Hann kastaði aktuelt kleyvara. Síðani spældi eystan spar ess og meira spar og fekk síðani 1 stikk til seinast upp á rútar frúgv.

Kastar hann í staðin spar, so fær eystan 2 sparstikk við at trekkja essið. Og kastar hann rút so vinnur mann við at spæla rút uttan at brúka frúnna!Við hitt borðið spældu Arne og Balli 1ut dublaðan heim eftir hjartara út til drongin og skift til spar til essið og meira spar. Arni gjørdi nú rætt við at spæla kleyvar ess og síðani kleyvar frúgv. Eftir tað var lætt at taka 7 stikk ☺